# Olivur við Neyst á vegginum

LIST
*Tíðindaskriv*

Fríggjadagin 7. nov. kl. 16 til 18 letur Olivur við Neyst upp listaframsýning í Galerie Focus í Gríms Kambansgøtu 20 í Havn. Temað fyri hesi framsýning er landslagið, bátabrúgvin, fólk, arbeiði og umhvørvið.

Framsýningin verður opin til 21. nov., týsdag til fríggjadag kl. 14 til 18 og leygardag kl. 16 til 18.

Olivur við Neyst, sum verður 50 ár í desember í ár. Sum listamaður fer hann út í náttúruni, skitsar og ger sínar fínu akvarellir, fer so heim og festir tær á lørift. Vit kenna Olivur aftur í tí koloristiska og tí sansaliga, at endurgeva essensin av umhvørvi, ljósi og rørðslu.

Framsýningin er opin týsdag til fríggjadag kl. 14 til 18, og leygardag kl. 16 til 18.

Fernisering er fríggjadag kl. 16 til 18.

Skráin hjá Galerie Focus komandi árið:

**2003**
7.-21. nov.:
*Olivur við Neyst*
5.-19. des.:
*Ymisk listafólk*

**2004**
6.-20. feb.:
*Heðin Kambsdal*
27. febr.-12. mars:
*Arnhold Vegghamar*
2.-16. apríl:
*Tróndur Patursson*
28. mai-11. juni:
*Hansina Iversen*
*og Vígdis Petersen*
2.-16. juli:
*Summarframsýning*
27. aug.-10. sept.:
*Eyðun av Reyni*
1.-15. oktober:
*Zacharias Heinesen*
29. okt.-12. nov.:
*Jóna Rasmussen*

# Skeið fyri sølufólk

SKEIÐ
*Tíðindaskriv*

Nú er møguligt hjá føroyskum seljarum at koma á kvalifiserað skeið fyri ein rímiligan penga.

Bo Wurden frá felagsskapinum »Danske Sælgere« er skeiðleiðari. »Danske sælgere«, ið er ein yrkiligur savningarmiðdepil við 25 ár á baki, hevur í dag meir enn 27.000 limir.

Sami danski felagsskapurin er hin einasti, ið leggur fullkomiligan dent á yrkissølu og er harumframt útbúgvingarstovnur, tá tað kemur til sølu.

Í tøttum samstarvi við felagsskapin »Danske Sælgere« verður skipað fyri útbúgvingarskeiði á Sjómansheiminum í Havn.

Nøkur pláss eru eftir, seinasta tegningarfreist er fríggjadagin 31. okt. 2003.

Tað er felagið Samskifti, sum stendur fyri skeiðnum.

# Hetlendingar siga frá um nýtt fornminnissavn

FUNDUR
*Tíðindaskriv*

Í sambandi við at ein sendinevnd úr Hetlandi í vikuni er í Føroyum, fara tveir av limunum at greiða frá um tað nýggja stóra fornminnissavnið, sum í hesum døgum er í gerð í Lerwick.

Fundurin verður í skúlastovuni í framsýningini hjá Føroya Fornminnissavni í Brekkutúni 6 í Hoyvík fríggjadagin 7. nov kl. 14.30-15.30, har Tommy Watt, stjóri á Shetland Museum og Brian Smith, stjóri á Shetland Archives við orðum og myndum lýsa, hvørjar hugsjónir liggja aftan fyri nýggja savnið, og hvørjar ætlanir eru við tí.

Fundurin er almennur.

# Fimm fløgur við Regin Dahl



*Á tíðindafundinum mánamorgunin legði plátufelagið Tutl fram fimm fløgur við Regini Dahl. Menninir aftanfyri útgávurnar eru, fv. Zacharias Wang, Kristian Blak og Kartni Fornagarð. Ætlanin er at geva tilsamans 20 fløgur út við trubadurinum, sum fyllur 85 ár mikudagin*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Regin Dahl fyllur 85 mikudagin 5. november og í sambandi við dagin, gevur plátufelagið Tult 5 fløgur út**

FLØGUÚTGÁVA
*Annika S. Biskopstø*
*Starvsnæmingur*

Plátufelagið Tutl gevur fimm fløgur út við Regin Dahl 5. november. Flestu upptøkurnar eru gjørdar miðskeðis í 70-unum niðri í Keypmannahavn. Á fløguni eru eisini sangir sum eru tiknir upp av privatfólki. Vit hoyra eisini kendar upptøkur, ið hava verið nógv spældar gjøgnum árini í útvarpinum, men ongantíð áður eru hesir góðu tónar hoyrdir á fløgu.

Komandi árið er ætlanin at geva allar upptøkurnar hjá Regini út á fløgu. Sangirnir eru nógvir og tískil verða 20 fløgur tilsamans. Hugskotið er gamalt, men er nú endiliga vorði veruleiki.

## VIÐMERKING

# Vi elsker jer kvinder!

## – »Yvirlýsing« um 'Kvinnufelagið í Havn'

**Peter O.K. Olofson**
*Klaksvig*



Vi elsker jer kvinder. Vi kan ikke andet end elske jer. I kvinder, i hvem vi er undfanget. I kvinder, som har båret os. I kvinder, som har født os. I kvinder, som har givet os bryst. Har trøstet os. Sat plaster på os. Opmuntret os. Rejst os, når vi er faldet. Taget os ved hånden og har ledt os. Lad det være sagt højt og klart og tydeligt: Vi elsker jer.

I tog os alvorligt og I kendte jeres etiske ansvar. Nogle af jer stod alene. Nogle af jer var under pres. Nogle af jer kendte øjeblikke, hvor alt gik i sort. Men I skrev jer ind i historien 'for livet' (pro vita). Andre opfordrer os i disse tider til at skrive 'for livet' (Amnesty International), men I – vores mødre – har allerede gjort det i gerning, da I gav os husly de første ni måneder. Et brev i kød og blod. Vi kan simpelthen ikke andet end elske jer og takke jer!!! Og den tak gælder også alle jer, der stod på vore mødres side og støttede dem, når de var trængt. I, der kæmpede imod dobbeltmoralen og hykleriet, der bl.a. siger, at bare det ikke opdages, gør det ikke noget.

Elskede kvinder: Vel var vi i jeres krop, men I vidste, at vi ikke var jeres krop, en gevækst, der efter behag kunne fjernes. Vi var ikke jeres krop, men jeres børn. Helt fra begyndelsen. Fra undfangelsen af.

I vidste, at det var nonsens, at I skulle have to hjerter, der slog, fire arme og fire ben, der mere og mere tydeligt kunne mærkes allesammen, for ikke at tale om fire nyrer, fire øjne, fire ører, to næser, to munde, o.s.v. Og havde vi en eller anden skavank, ja, så elskede I os også trods denne skavank. Fik vi lov til at leve fem minutter, en time, ti timer eller 70 år, så var, er og bliver vi dog jeres børn og I vores mødre. Og mistede I os undervejs – før vi så dagens lys – så var jeres kærlighed ikke mindre, ej heller jeres sorg. I kæmpede, I stred, I bar byrden – for vor skyld. Vi elsker jer.

Vi takker jer for, at I ikke tænkte som 'Kvinnufelagið í Havn' jf. Sosialurin, Fregnir og Dimmalætting d. 31/10-2003. Vi takker jer for, at I ikke bekrigede os med p-piller, mini-piller, spiraler eller fortrydelsespiller – der alle kunne have taget vort liv (1). Vi takker jer for, at I ikke satte ind med medicinske eller kirurgiske aborter. Vi takker jer for, at fødslen ikke blev sat i gang, blot for at vi skulle dø.Vi takker jer for, at vi kunne vokse op i bevidstheden om, at vi ikke lige så godt kunne have mødt bøddelens hånd, hvis nu omstændighederne havde været nogle andre. Vi takker jer for, at vi ikke med jeres gode vilje, har mistet nogle af vore søskende. Vi takker jer for, at vi i ét og alt, har kunnet stole på jeres omsorg fra vort livs begyndelse, da æg og sædcelle smeltede sammen. Vi elsker jer kvinder – mødre.

Er vores kærlighed og tak til jer vores mødre 'stein oman á byrðu' for andre, nemlig alle dem, der ikke handlede som jer, så vil vi gerne sige: 'Den sten oveni byrden' kommer vi ikke udenom. Men vi stopper ikke her, hvor andre tilsyneladende vil stoppe, nemlig ved Guds lov, der afslører og dømmer synden. Vi kender også evangeliet. Der er tilgivelse at få for den, der angrer sin synd. Også et drab. Ikke blot stenen skal væk men også byrden jf. Matt 12,28. Gid 'Kvinnufelagið í Havn' kendte både loven og evangeliet.

1) Læs bl.a. apotekets pjece om 'Fyribyrging'.



# Fara at byggja stórt mentanarhús í Runavík

**Sambært ætlanini hjá Mentanarhúsfelagnum, verður ætlaða mentanarhúsið í Runavík einar 800 fermetrar stórt. Runavíkar kommuna hevur víst felagnum á eitt øki, og gongst sum ætlað, er hugsandi, at spaki verður settur í um hálvt annað ár ella so**



*Ætlandi verður mentanarhúsið í Runavík bygt á hesum øki – millum skúlan í Runavík og húsini hjá Meinhardi.*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

BYGGING
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Sunnudagin hevði Mentanarhúsfelagið í Runavíkar kommunu aðalfund í býráðssalinum í Saltangará. Umframt nevndina, vóru eini 20 fólk møtt á fundinum, har formaðurin, Kári Thorsteinsson, legði fram ársfrágreiðing og roknskap felagsins. Eitt modell av ætlaða mentanarhúsinum, sum Eyðun Petersen, verkfrøðingur, hevur gjørt, varð eisini víst fram.

Nývald í nevndina varð Doris Djurhuus, og nýggir tiltakslimir eru Nina Petersen og Bárður Højgaard. Hini í nevndini eru Kári Thorsteinsson, formaður, Hans Olsen, Eyðun Gaardbo og Kenneth Rasmussen.

Nýggja nevndin hevur ikki skipað seg enn, men væntandi er, at Kári Thorsteinsson heldur fram sum formaður. Tað verður greitt í hesi vikuni.

### Endurstovnað

Málið hjá Mentanarhúsfelagnum er, sum tað liggur í navninum, at byggja eitt mentanarhús í kommununi.

Felagið aftanfyri hesa ætlan hevur sína søgu. Tað var í 1975, at eitt bygdarhúsfelag varð stovnað í kommununi við sama endamáli. Fyrst í áttatiárunum datt felagið niðurfyri, men varð seinni endurstovnað undir nýggja navninum, Mentanarhúsfelagið.

Longu, meðan bygdarhúsfelagið var virkið, savnaði felagið nakað av pengi til endamálið, og hesin peningur er so fallin til nýggja felagið, sum eisini hevur havt ymiskt tiltøk, eitt nú fyrilestrar, kvøldsetur, sjónleikir og konsertir.

Í dag eigur felagið nakað av peningi at arbeiða við.

### Ætlanin nærkast

Í nøkur ár hevur Mentanarhúsfelagið saman við kommununi leitað eftir einum øki, har húsið kann byggjast. Nógv økir hava verið uppi og vent, men nú er hendan leitanin eftir øllum at døma komin undir land.

Mentanarhúsfelagið og Runavíkar kommuna eru samd um, at best egnaða økið til bygging av einum slíkum húsi er vestanfyri skúlan í Runavík – á leiðini millum skúlan og húsini hjá Meinhardi.

Kommunan eigur hetta økið og hevur víst felagnum á, at her kann húsið hóskandi byggjast. Enn er lendið ikki keypt, og samráðingarnar við kommununa eru ikki lidnar. Nevndin í felagnum heldur, at júst hetta økið er sera væl egnað.

Ætlanin er at útbyggja skúlan í Runavík, og tí verður hugsað, at eitt fruktargott samstarv kundi verið millum skúlan og mentanarhúsið, tá ið bygningarnir koma at liggja so tætt uppat hvørjum øðrum.

### Byggja samstundis

Kenneth Rasmussen, sum situr í nevndini í Mentanarhúsfelagnum, dugir ikki at siga, nær byggingin av mentanarhúsinum byrjar, men óhugsandi er ikki, at spakin verður settur í um hálvt annað ár ella so.

– Vit miðja eftir at byrja um somu tíð, sum Runavíkar skúli verður útbygdur. Vit hugsa okkum, at hetta kundi verið praktiskari og kanska eisini nakað bíligari við tað, at amboðini tá eru á staðnum.

Hann vísir á, at enn er eingin endalig kostnaðarmeting gjørd.

– Higartil eru bara høvuðslinjurnar lagdar í rímiliga fastar rammur, men arbeiðast má víðari við ymisku detaljunum.

Kenneth sigur, at felagið hevur ikki søkt um nakra fígging. Áðrenn tað verður gjørt, mugu øll viðurskifti við grundøkinum og tekningum verða komin uppá pláss.

### Sjónligur bygningur

Ætlandi verður mentanarhúsið í Runavík einar 800 fermetrar stórt – í einari hædd og onkustaðni í tveimum.

– Vit hugsa okkum, at mentanarhúsið fer at skipa fyri ymiskum tiltøkum, ið líkjast teimum, sum eru í mentanarhúsinum í Fuglafirði. Her verða tiltøk fyri øll, og somuleiðis er ætlanin, at onnur skulu kunna leiga húsið til ymiskar aktivitetir.

Kenneth Rasmussen væntar, at fyrireikingararbeiði, ið eftir er, skuldi verið komið væl áleiðis um eitt ár ella so

– Vit halda, at økið, sum kommunan hevur víst felagnum á, liggur ógvuliga væl og sentralt fyri, tí her fer mentanarhúsið at síggjast bæði av Gøtueiði, av vestara armi á Skálafjørðinum og úr allari Runavíkar kommunu, sigur hann at enda.

# Upsin eru nú eina krónu dýrari

**Nýggju trolararnir hjá P/F Beta, Bakur og Stelkur, landaðu 300.000 pund av upsa í Saltangará mánadagin**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Mánamorgunin landaðu nýggju trolararnir hjá P/F Beta, Bakur og Stelkur, í Saltangará. Samlaða veiðan vá út við 300.000 pund, og meginparturin var upsi.

Ragnar Olsen sigur, at umleið helmingurin av veiðini verður seld føroyskum virkjum, meðan hin helmingurin fer at landinum.

### Frægari upsaprísur

Spurdur um prísin, sigur hann, at upsaprísurin í dag liggur millum 3,50-4 kr. fyri kg., og tað er umleið ein króna meira, enn tá ið prísirnir vóru lægstir í summar og tíðliga í heyst.

Áður hevur Ragnar sagt, at tað stóð upp og niður hjá nýggju Beta-trolarunum fyrra hálvár í ár, men hann ásannar, at gongdin versnaði í juli og august.

– Tað er ein bati, at prísirnir eru kvinkaðir uppeftir aftur, men tað skal nógv til, áðrenn vit kunnu siga, at tað hevur gingið hampiligt í ár.

### Garantieftirlit

Ætlandi skuldu nýggju skipini til garantieftirlit síðst í hesum árinum, men eftirlitið er nú útsett til komandi summar, tá ið skipini helst fara niður til Spaniu, har tey eru bygd.

– Tískil verða skipini í vinnu í vetur og í vár, tá ið væntast kann, at frægast kemur burtur úr. Summarið er vánalig fiskitíð, og tá eru prísirnir oftast lágir, leggur Ragnar Olsen aftrat.




*Bakur og Stelkur landaðu í Saltangará mánamorgunin. Helmingurin av veiðini fer til føroysk virkir, meðan hin helmingurin fer av landinum*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*